Summi gó› tilbo› frá SL

Hví kunnu ikki øll fáa tilbo› frá SL, vil Jóanis Nielsen hava at vita frá fer›slumálará›harranum

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
Ólavur í Beiti

Jóanis Nielsen, løgtingsma›ur, hevur spurt Bjarna Djurholm, fer›slumálará›harra, fyrispurning, og vil hava at vita frá fer›slumálará›harranum, um Strandfer›slan bjó›ar kundum sínum a›rar avsláttarskipanir enn tær, sum eru alment kendar? Og um so er, hvørjar, og hví kunnu ikki øll fáa hesi tilbo›?

Misnøgd

Í vi›merkingunum, sigur vágatingma›urin, at ta› hevur ligi› á ljó›i, at nøkur, sum fer›ast vi› Strandfer›sluni, fáa betri tilbo› enn tey alment kendu.

– Slíkt elvir sjálvandi til misnøgd og eigur at fáast á beint aftur ongantí› ov skjótt, sigur Jóanis Nielsen í fáor›a›u vi›merkingunum, uttan nágreinliga at koma inn á, hvørji tilbo› talan er um og hvar í landinum.

Fíggjarmálst‡ri › fingi› umsóknir um tollfría sølu

Landsst‡ri› hevur tiki› stø›u til, at tollfrí søla skal vera á flogvøllinum, men at avger› ikki er tikin um, hvør ella hvørji, i› fáa loyvi til tollfría sølu, sigur Karsten Hansen

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
Ólavur í Beiti

Ta› er Jákup Sverri Kass, løgtingsma›ur, sum nú eisini hevur spurt fíggjarmálará›harran um tollfría sølu á Flogvøllinum í Vágum. Í svarinum sigur fíggjarmálará›harrin, at roknast má vi›, at eitt øki vi› fleiri tollfríum sølubú›um á flogvøllinum alt anna› líka fer at økja um tollfríu søluna í mun til í dag. Og ta› er ein stø›a, i› kemur føroysku handils- og framlei›sluvinnuni til gó›ar. Ta› er hinvegin meiri torført at siga, hvørja ávirkan ein tollfrí søla á flogvøllinum fer at fáa á landskassan.

– Eisini skal nevnast, at ein t‡andi partur av rakstraryvirskotunum hjá flogfeløgunum, i› flúgva upp á Føroyar, stavar frá tollfríari sølu umbor› á flogførunum, sigur Karsten Hansen.

Kartsen Hansen vísur eisini á, at í dag hevur Rúsdrekkasøla Landsins einkarrættin til sølu av rúsdrekka í Føroyum. Men, í allarflestu tollfríu sølubú›unum á flogvøllum kring um í heiminum er ta› heldur regulin enn undantaki›, at rúsdrekka ver›ur selt saman vi› ø›rum n‡tsluvørum.

– Tí meini eg, at stø›a fyrst má takast til spurningin um einkarsøluna av rúsdrekka, á›renn ein kunnger›, i› nærri ásetir reglur um tollfría sølu á flogvøllinum, ver›ur gjørd.

34 mió.

Karsten Hansen sigur eisini, at Statens Luftfartsvæsen hevur gjørt uppskot til út- og umbygging av terminalinum fyri uml. 34 mió. kr. Hendan byggingin fevnir um n‡ggja fráfaringar- og vi›førishøll, umbygging av verandi terminali o.a.

– Vi› hesi um- og útbygging av flogvøllinum er eisini ætlanin at skapa betri fortreytir fyri handilsvinnu á flogvøllinum, solei›is at farast kann undir tollfría sølu, solei›is sum vit kenna hana a›rar sta›ir frá.

– Donsku myndugleikarnir hava enn ikki givi› tilsøgn um játtan til út- og umbygging av terminalinum, men mett ver›ur, at tollfrí søla - um enn í minni mátistokki enn annars hugsa› - kann setast í gongd, um verandi høli ver›a umbygd, sigur Karsten Hansen m.a. í svarinum til fyrispurning um tollfría sølu á Flogvøllinum.

Pan Fish ver›ur kanna› av myndugleikunum

Pan Fish, sum hevur keypt seg inn í føroyska alivinnu, er nú eisini farin at keypa partabrøv í norska nótaflotanum

Savnsmynd

Alifyritøkan Pan Fish ynskir at hava fleiri bein at standa á, og hevur keypt seg inn í pelagiska vinnu. Men møguliga ste›ga norskir myndugleikar hesum.

FISKIVINNA
Jógvan Hugo Gardar, Oslo

Skal eitt felag sum er skrásett á vir›isbrævamarkna›inum kunna keypa seg inn í fiskibátar? Hendan spurningin arbei›a norska fiskivinnumálará›i› og fiskivinnuskrivstovan vi›.

Orsøkin til spurningin, er at Pan Fish hevur keypt seg inn í átta norskar nótabátar og situr vi› minst 49 prosent av partabrøvunum. Millum hesar finna vit eisini tann í Føroyum skrásetta Krúnuna. Nor›menn kalla hendan bátin norskan, tí hann er fíggja›ur vi› norskum kapitali.

Norskir myndugleikar skullu gó›kenna allar broytingar í eigaravi›urskiftum í norskum fiskibátum.

Spurningurin er at tá eitt felag er skrásett á vir›isbrævamarkna›inum, so kunnu ognarvi›urskiftini broytast eftir fáum minuttum.

Norska løggávan er ikki tilpassa hesum møguleikanum.

Sambært internettænastuni IntraFish arbei›a myndugleikarnir nú vi› at broyta løggávuna.

Fleiri fer›sluóhapp enn á nøkrum ø›rum vegastrekki

Jákup Suni Joensen heitir á fer›slumálará›harran um at fáa vegarbei›i› gjørt li›ugt sum eina heild frá n‡ggju snaringini á Oyrareingjum og heilt yvir á Signabø

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
Ólavur í Beiti

– Nær byrjar arbei›i› at gera n‡ggju vegsnaringina á Oyrareingjum? Hvat ætlar landsst‡risma›urin vi› teimum uml. 800 metrunum av landsvegi frá snaringini yvir á Signabø? spyr Jákup Suni Joensen í fyrispurningi til Bjarna Djurholm, fer›slumálará›harra.

Í vi›merkingunum sigur Jákup Suni Joensen, at á fíggjarlógini fyri 2000 stendur, at 400.000 kr. eru settar av til n‡ggja vegsnaring á Oyrareingjum. Meginparturin av upphæddini er til keyp av lendi. Á komandi fíggjarlóg er skoti› upp at seta 1,5 mió. kr. av til sjálvt arbei›i› at gera svingi›.

– Higartil eru bara steyrar settir ni›ur. Men nú er so langt li›i› út á ári›, at um arbei›i› ikki fer í gongd á›renn árslok, skulu útvegir finnast fyri n‡ggjari játtan eitt seinni fíggjarár. Tí vóni eg, at landsst‡risma›urin kann vátta, at tær 400.000 kr., sum eru settar av í ár, ver›a n‡ttar, so skjótt ver›ur settur á hetta arbei›i›, sigur Jákup Suni Joensen.

Vaksandi virksemi

Og ví›ari sigur tingma›urin, at vi›víkjandi vegnum út á Signabø, so hava fleiri fer›sluóhapp veri› enn á nøkrum ø›rum vegastrekki av líknandi longd. Hann liggur oman fyri eitt ídna›arøki og ber tískil tunga fer›slu. Víst ver›ur eisini til ta vaksandi vinnuliga virksemi› á Signabø, bilverksta›ur, fleiri lastbilavirki, timburvirki, bóndagar›ur, handil, bátahylur og vaksandi fólka- og barnatal.

– Tí trokar á at fáa henda landsveg brei›ka›an og gjørdan tryggari til fólk og bilar, og heitir Jákup Suni Joensen á fer›slumálará›harran at fáa hetta vegarbei›i› gjørt li›ugt sum eina heild frá n‡ggju snaringini á Oyrareingjum og heilt yvir á Signabø.

Kósin rætta› í dag

Samrá›ingarsliti› í fullveldismálinum hevur skapt politiska ørkymlan í Føroyum. Ósemja er í samgonguni, og andstø›an skj‡tur upp n‡val, samstundis sum Fólkaflokkurin er farin at fríggja til Javna›arflokkin. Landsst‡ri› hevur lova› at melda út hvussu stø›una í dag

POLITISK ANALYSA
Magnus Dam og John Johannessen

Rættuligur spenningur hevur tiki› seg upp í politiska heiminum í Føroyum, sí›ani fullveldisætlanin hjá landsst‡rinum miseydna›ist fyri viku sí›ani.

T‡sdagin kom spenningurin í hæddina, tá løgma›ur eftir ein rættuliga har›an landsst‡risfund bo›a›i frá í útvapinum, at leisturin, sum landsst‡ri› hevur arbeitt eftir, har suveriniteturin her og nú er ovasta máli›, er ikki naka›, sum politiskt og innan tí›arkarmarnar førir á mál. Tí bo›a›i hann frá, at landsst‡ri› hevur lagt ætlanina á hillina.

Men Høgni Hoydal sta›festi fyri Sosialinum beint eftir tí›indini, at landsst‡ri› framvegis arbei›ir eftir teimum løgtingssamtyktum, sum fyriliggja í fullveldismálinum, og at hann hev›i gjørt nøkur uppskot, sum nú skulu vi›gerast í landsst‡rinum. Varaløgma›ur vildi kortini ikki gera beinlei›is vi›merkingar til innslagi›.

Vi›gjørt stø›una

Sí›ani hava ting- og landsst‡rismanningarnar hjá bæ›i Fólkaflokkinum og Tjó›veldisflokkinum havt fund um stø›una. Fólkaflokkurin er eftir fundin púra samdur um, at fullveldisætlanin er miseynda›. Flokkurin vil í sta›in hava eina n‡ggja skipan millum Føroyar og Danmark.

Tjó›veldisflokkurin vi›gjørdi eisini stø›una á sínum vikuliga fundi t‡skvøldi›. Høgni Hoydal, forma›ur í Tjó›veldisflokkinum, vil ikki siga naka› anna› alment um fundin, enn at ørkymlandi stø›an í Føroyum eftir samrá›ingarnar hóskvøldi› var› ved og vir›iliga vi›gjørd á fundinum.

– Eg havi ongar vi›merkingar til ítøkiligu stø›una beint nú. Men eg kann tó sta›festa, at vit hava fingi› eitt paratapolitiskt spæl seinastu dagarnar, har flokkarnir eru farnir at melda út hvør sær.

– Ta› er ógvuliga umrá›andi, at samgongan meldar út í felag, og ta› fara vit at gera hósdagin, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal vísir á, at orsøkin til,at partapolitiska spæli› hevur tiki› seg upp er, at stø›an er vor›in so ørkymlandi, at baklondini hjá samgonguflokkunum eru farin at melda út hvør í sínum lagi, uttan at hava tosa› saman frammanundan. Men hann vísir á, at hetta ikki merkir, at partarnir eru ósamdir.

Grundleggjandi ósemja

Hóast Høgni Hoydal sta›festir, at samgongan stendur væl og vir›iliga saman, er nógv, i› bendir á, at ein grundleggjandi ósemja hevur tiki› seg upp ímillum teir bá›ar størstu flokkarnar í samgonguni, nevniliga Fólkaflokkin og Tjó›veldisflokkin.

Tøgn er í landsst‡rinum til í kvøld, tá landsst‡ri› skal koma vi› einí felags útsøgn. Men vóru partarnir heilt samdir, var ikki ney›ugt at brúka tveir dagar til at finna felags útsøgnina. Líkt er til, at flokkarnir vilja brúka tí›ina fram til í kvøld, at vita um ta› veruliga ber til at finna saman um eina loysn.

Ítøkiliga stø›an er, at Fólkaflokkurin vil hava eina n‡ggja skipan vi› Danmark, sum í fyrsta umfari merkir, at vit ver›a ver›andi í ríkisfelagsskapinum í nøkur ár afturat. Hetta gó›tekur Tjó›veldisflokkurin, sum hevur sum a›almál at koma út úr ríkisfelagsskapinum, ikki.

Tá i› løgma›ur var› spurdur í sjónvarpinum t‡sdagin, um samgongan er samd, svara›i hann, at ta› er ov tí›liga at siga enn.

– Talan er um eina heila tilgongd, og hon er naka› ø›rvísi enn hon, vit hava arbeitt eftir higartil, seg›i løgma›ur.

Í somu tí›indasending sta›festi Høgni Hoydal, at øll sjálvst‡risuppskot, higartil eru komin úr hansara penni, og ta› fara tey eisini at gera í framtí›ini.

Fólkaflokkurin fer ikki at víkja frá síni ætlan. Løgma›ur hevur ásanna›, at ta› ikki kemst ví›ari, uttan sjálvt kravi› um fullveldi fyribils ver›ur útsett. Ta› er løgma›ur, i› er samgongulei›ari, og hann ætlar at halda fast vi› sítt. Skal ein semja finnast, má Tjó›veldisflokkurin bakka.

Partarnir skuldu hittast at vi›gera stø›una seinnapartin í gjár, eftir at bla›i› var fari› til prentingar.

F‡ra møguleikar

Sí›ani ta› var greitt, at fullveldisætlanin í verandi líki er miseyna›, hevur nógv samband veri› millum Fólkaflokkin og Javna›arflokkin handan politisku leiktjøldini. Tí er møguleiki fyri, at loysnin á fullveldismálinum ver›ur ein loysn, har Javna›arflokkurin er vi›.

Talan ber í veruleikanum til at hugsa sær f‡ra loysnir á ósemjuni í samgonguni.

Fyrsta og mest sannlíka loysnin er, at ta› eydnast samgonguni at gerast samd um eina felags loysn.

Ein onnur loysn er, at ta› eydnast samgonguni at broyta uppskoti› solei›is, at Javna›arflokkurin antin kann koma upp í samgonguna ella gerast stu›ulsflokkur hjá samgonguni. Hetta er ein loysn, i› hev›i tryggja meiriluta vi› eina fólkaatkvø›u.

Ein tri›ji møguleiki er, at ta› ikki eydnast Tjó›veldisflokkinum og Fólkaflokkinum at semjast, og at Tjó›veldisflokkurin tiskil fer úr samgonguni. Sí›ani ver›ur ein n‡ggj samgonga skipa› millum Fólkaflokkin, Javna›arflokkin og Sjálvst‡risflokkin.

Eisini kann hugsast, at Javna›arflokkurin fer at seta sum krav, at Sambandsflokkin skal vi› í eina slíka samgongu, og tí er ein fjó›ri møguleiki fyri at fáa eina brei›a og sterka samgongu millum Fólkaflokkin, Javna›arflokkin, Sambandsflokkin og Sjálvst‡risflokkin.

Hvørja lei› ta› ber, fáa vit nærri at vita, tá landsst‡ri› í kvøld kemur vi› einari útmelding. Ver›ur útmeldingin frá landsst‡rinum ein loysn, i› andstø›uflokkarnir á ein ella annan hátt kunnu taka undir vi›, er hugsandi, at teir fara at taka uppskoti› um n‡val, sum teir hava lagt fyri tingi›, aftur. Ver›ur talan um eina loysn, teir ikki taka undir vi›, fara teir uttan iva at halda fast vi› uppskoti›.

Kalt er millum samgongufólk í Tinganesi í hesum døgum. Í kvøld fæst at vita, hvør endin á ósemjuni ver›ur

Savnsmynd